# Havnin í Kollafirði byggjast munandi út

**Nú skulu gerast 160 metrar av atløguplási afturat í Kollafirði til stór skip**

ÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Kollfirðingar fáa nú 160 metrar av djúphavn afturat og tað fer at gera umstøðurnar munandi betri*

Nú verður farið undir at byggja havnalagið í Kollafirði munandi út.

Í hesum sambandi er ætlanin at byggja bryggjurnar á Langasandi saman og tilsamans er ætlanin at gera 160 metrar av atløguplássi afturat. Og talan verður um eina rættiliga djúphavn, har stór skip kunnu liggja.

Fyri nøkrum árum síðani varð ein 100 metra long bryggja gjørd á Langasandi í Kollafirði.

Hendan bryggjan bleiv gjørd í sambandi við at ein stór frystigoymsla bleiv bygd á havnaøkinum.

Fyri at økta bráðneyðuga tørvin varð bryggjan bygd 60 metrar eystan fyri bryggjuna framman fyri virkinum hjá Vestsalmon.

Seinni var aftur farið undir at gera eina eina nýggja bryggju 100 metrar eystanfyri bryggjuna við frystigoymsluni.

Samstundis varð stóra uppisjóvarvirkið hjá Kollafjord Pelagic bygt.

Tórshavnar Býráð vísir á, at nú er rættilig gongd komin á virksemið á á havnaøkinum í Kollafirði.

Í 2003 vóru inntøkurnar hjá Kollafjarðar Havn 1,3 millión krónur, men í 2005 eru inntøkurnar mettar at verða 3,7 milliónir krónur.

– Sum umstøðurnar eru nú, ber bara til at avgreiða tvey skip ísenn og hetta ger at tað ofta er torført at avgreiða skipini, sum máa bíða, ella fara aðrastaðni.

Tí er ætlanin nú at byggja allar bryggjurnar saman. Sostatt er ætlanin at byggja bryggjurnar saman, bæði ímillum Vestsalmon og Kloosterboer og ímillum Kloosterboer og Kollafjord Pelagic.

Tað, sum skal gerast, er ein 60 metra long bryggja ímillum Vestlaks og Kloosterboer. D‡pið við bryggjuna verður 9,8 metrar.

Samstundis skal ein bryggja upp á 100 metrar gerast ímillum Kloosterboer og Kollafjord Pelagic. D‡pið við ta bryggjuna verður 12 metrar, so talan verður um rættiligar djúphavnir, sum nú skulu gerast í Kollafirði.

Arbeiðið er bjóðað út og fýra byggifeløg bjóðaðu. Rættiliga hørð kapping var um arbeiðið, tí tað vóru bara ein góð hálv millión á muni ímillum tað bíligasta og tað dýrasta tilboðið.

Men tá ið avtornaði hevði Articon tað bíligasta tilboðið og teir kunnu gera arbeiðið fyri 20,8 milliónir. Harafturat koma góðar 3 milliónir til eftirlit og annan kostnað.

Byggitíðin er mett at vera eitt ár.

Seinni er so ætlanin at gera eitt enn størri havnaøkið eystan fyri Kollafjord Pelagic, men tað verður gjørt sum ein sjálvstøðug ætlan seinni.


NORÐOYA SPARIKASSI

**Eykaðalfundur**

Norðoya Sparikassa hevur eykaðalfund

**Týsdagin 17. januar 2005 frá kl. 15.00 til 17.00**
á høvuðsskrivstovu sparikassans, Ósávegur 1 í Klaksvík

við hesi dagskrá:

1. Val av fundarstjóra.
2. Viðtøkubroytingar.
3. Val av grannskoðarum.
4. Ymiskt.

Nevndin

Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík Tel: 475000 Fax: 476000
ns@ns.fo www.ns.fo

SØLURÁÐGEVARI

HTH køksmiðstøðin

ARBEIÐIÐ
Vit gleða okkum til at styrkja toymið við einum nýggjum søluráðgeva, sum egnar seg væl til at vegleiða viðskiftafólki okkara. Tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt við at geva tilboð og at fylgja teimum upp, umsita bíleggingar vm. Eisini kemur tú at taka lut í øðrum uggávum í handlinum. Títt nýggja arbeiði er ikki eitt vanligt 37 tíma arbeiði.





TÚ ERT
Vit sóknast eftir einum persóni, sum er opin, megnar væl at skera í gjøgnum og er dugnaligur seljari. Tær dámar at verða máldur eftir tínum avrikum og úrslitum – og tú dugir væl at hugsa viðskiftafólkfelag-tú sjálvur í nevndu raðfylgju. Tú trívist væl, tá ið tíðin er knøpp og arbeiðstíðirnar liðiligar. Tú ert helst longu innan somu vinnu ella hevur líknandi bakgrund við royndum innan smásølu og við beinleiðis kundarøkt. Ikki minst ert tú góður til at loysa fjøltáttaðar uppgávur og hevur flair fyri at nýta KT.

VIT KUNNU BJÓÐA
Tú verður ein partur av einum toymi við góðum starvsfeløgum, har tónin er lættur og samanhaldið umráðandi. Títt arbeiðspláss hevur snøgg søluhølir, og tú fært eina miðvísa útbúgving í okkara egnu útbúgvingarmiðstøð. Vit raðfesta eisini tína persónligu menning. Løn tín verður bygd á tínar dygdir.

Vit gleða okkum til at frætta frá tær áðrenn 01.02.2006. Starvsetanin er eftir avtalu og umsóknin skal sendast til:

HTH Køksmiðstøðin
Staravegur 5, boks 1201
Att: Vinjard Johansen Leiðara
ella ring á tel 224051 ella 31 4949

...tú fært tað munandi betri hjá HTH